# ítróttur

Nr. 124 • leygardagur • 2. juli 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo


# B68 gjørdi bart

**Toftamenn settu sandoyingar so ruddiliga upp á pláss, tá ið finalan í kappingini um FSF-steypið var leikt á ovara vølli í Gundadali hóskvøldið. B68 vann ein greiðan 5-1 sigur, men um B71 tók av møguleikunum í byrjanini av dystinum, hevði søgan kanska verið ein onnur**



*Gott lag var á toftamonnum eftir sigurin í kappingini um FSF-steypið í Gundadali hóskvøldið.*

Mynd: Álvur Haraldsen

STEYPAFINALA


*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


Stásiliga FSF-steypið, sum liðini uttan fyri Formuladeildina kappast um, skal næsta árið standa í steypaskápinum í B68-húsinum á Svangaskarði. Hetta gjørdist greitt, tá ið toftamenn smurdu B71 av í finaluni um FSF-steypið hóskvøldið.

At leikandi venjarin hjá B68, landsliðsleikarin Julian Johnsson, ikki var við á liðnum hjá toftamonnum, tí at hann fekk drúgva skurðviðgerð í Danmark allan hósdagin, sást ikki aftur á vøllinum, tí B68 var greitt við yvirlutan eftir eina heldur trilvandi byrjan upp á dystin.

## B71 hevði sínar møguleikar

Tað var annars B71, sum byrjaði dystin best, og sandoyingar høvdu fleiri gyltar møguleikar at leggja seg á odda. Serliga var tað vandamikli brasiliumaðurin Clayton Soares, ið lá framvið, men hann hevði tíverri fyri B71 alt ov ofta hug til at velja truplaru loysnina, tá ið málmøguleikar stungu seg upp.

Og sum so ofta, tá ið eitt lið ikki tekur av sínum møguleikum, verður tað revsað í hinum endanum. B68 fótaði sær so líðandi, og tá ið fyrri hálvleikur var gott og væl hálvrunnin, tóku toftamenn leiðsluna.

Eitt innlegg úr høgra borði endar í handaru síðu av brotsteiginum hjá B71, og har stendur veteranurin Øssur Hansen. Hann leggur bóltin til sítt víðagitna vinstrabein og meddar til. Bólturin rakar í ein verjuleikara hjá B71 og snýtir unga Símun Rógva Hansen í málinum hjá sandoyingum, og so er 1-0 til B68.

Stutt fyri hálvleik var um reppið, at B71 javnaði, tá ið Clayton Soares gjørdist leysur nakað úti í vinstru síðu av brotsteiginum hjá B68. Brasiliumaðurin skýtur hart og flatt eftir jørð, men Albert í B68-málinum var knappur og kemur væl niður og heldur skotinum.

Ístaðin er tað enn einaferð B68, sum revsar mistøkini hjá B71, tá ið farið var út um vanligu leiktíðina í fyrra hálvleiki. Ein langur bóltur verður sendur inn um verjuna hjá B71, og Jóan Petur Poulsen gerst leysur. Jóan Petur sær, at Símun Rógvi Hansen er komin dekan ov langt út, og hann lyftir bóltin upp um unga málverjan og í netið til 2-0.

## John dugir enn

Í seinna hálvleiki royndi B71 at trýsta fyri at koma upp á javnt, men tað gekk striltið hjá teimum at koma til teir stóru málmøguleikarnar. Alt ov ofta dúvaði álopsspælið hjá sandoyingum upp á einmansavrik, og verjan hjá B68 tóktist at hava tamarhald á støðuni allatíðina.

Dysturin fekk í veruleikanum sína avgerð, tá ið smáir tíggju minuttur vóru farnir av seinna hálvleiki. Tá var Jóan Petur Poulsen aftur upp á spæl í brotsteiginum hjá B71. Hóast hann var staddur heilt afturi við baklinjuna í høgru síðu, so eydnaðist tað honum onkursvegna at senda bóltin flatt eftir jørð og í netið til 3-0, og nú gjørdist mótbrekkan hjá B71 ov tung.

Sandoyingar royndu tó at satsa eitt sindur, og millum annað bleiv liðskiparin, Bergleif Sólsker, fluttur av sínum vanliga plássi í miðverjuni longur fram á vøllin, men av tí sama gjørdist tað heldur tunnligt í verjupartinum hjá sandoyingum.

Hetta gjørdi John Petersen sær dælt av, tá ið hann í 65. minutti gjørdist leysur framman fyri B71-málinum. Símun Rógvi kom út ímóti, men gamla landsliðskempan lyfti hegnisliga bóltin upp um málverjan hjá sandoyingum og í netið. Tað eydnaðist tó B71 at koma á máltalvuna, tá ið Clayton Soares 20 minuttir fyri leiklok fekk skorað úr spískum, men sigurin hjá toftamonnum var ongantíð í vanda. At so var, bleiv eisini staðfest fimm minuttir fyri tíð, tá ið innskifti Øssur Jacobsen skoraði til 5-1 og slóg sigurin fastan.

Eftir loknan dyst handaði Bjarki Mohr, formaður í kappingarnevndini hjá FSF toftamonnum steyp, og bæði liðini fingu medaljur.





*Símun Hansen hjá B71 og Kristian Anton Andreasen hjá B68 dystast um bóltin.*

Mynd: Álvur Haraldsen

## FAKTA UM FSF-STEYPIÐ

**B71-B68 1-5(0-2)**
0-1 Øssur Hansen 25.
0-2 Jóan Petur Poulsen 45.
0-3 Jóan Petur Poulsen 54.
0-4 John Petersen 65.
1-4 Clayton Soares 70.
1-5 Øssur Jacobsen 85.
**B71:** Símun Rógvi Hansen - Bergleif Sólsker, Eirikur Poulsen, Kári Sørensen, Hanus Clementsen - Gert Lydersen(Gudmund Nielsen 54.), Magnus Olsen (Jákup Sørensen 58.), Eli Hentze, Símin Hansen (Mikkjal Hentze 77.) - Clayton Soares, Tummas Pauli Olsen
**B68:** Albert Sævarsson - Alex Troleis(Jóhan D. Højgaard 74.), Ovi Magnussen, Arnbjørn Danielsen, Jákup Eli Olsen - Kristian Anton Andreassen (Fabricio Borges 83.), Jann Ingi Petersen, Bogi Petersen, Øssur Hansen - John Petersen(Øssur Jacobsen 80.), Jóan Petur Poulsen
**GK:** Gert Lydersen, Clayton Soares, Símin Hansen, Kári Sørensen - Jákup Eli Olsen, Ovi Magnussen, Jann Ingi Petersen
**Dómari:** Georg Rasmussen

John Petersen, B68:

## - Altíð stuttligt at vinna

Toftamenn hava styrkt sær um liðið við fyrrverandi landsliðskempuni, John Petersen, sum í løtuni er heima í summarfrí. Í finaludystinum móti B71 hóskvøldið var John í álopinum hjá toftamonnum í 80 minuttir, og hann fekk eisini víst sítt eyðkenda máltev.

Men er tað ikki trupult hjá einum spælara, ið er vanur við at spæla landsdystir móti stórum tjóðum, finalur um Løgmanssteypið og dystir, har FM-heiti stendur upp á spæla, at seta seg upp til dystir við einum liði í næstfremstu deildini:

- Nei, tað er ikki so galið. Nú havi eg bert verið við hjá B68 í tveir dystir, og í báðum førum hevur talan verið um avgerandi dystir. Fyrri dysturin var í landskappingini móti FS Vágum, og hin er so steypafinalan í dag. Hvussu verður, tá ið vit skulu spæla móti onkrum av lægru liðunum í 2. deild, veit eg ikki, sigur John Petersen.

Fyrrverandi framherjin á føroyska landslinum leggur afturat, at tað er altíð stuttligt at vinna, og tí hevur ein slíkur dystur sum finalan móti sandoyingum eisini nakað at siga.

John hevur seinasta hálvárið leikt við Holstebro í Danmark, sum flutti út úr triðbestu donsku deildini. Eftir summarfrítíðina fer John at spæla við Skive í danmarkarseriuni, sum hann eisini leikti við í 1994/95, tá ið hann las í Skive.

**tn**



*John Petersen skoraði eitt av málunum, tá ið B68 hóskvøldið vann greiðan 5-1 sigur á B71 í finaluni í kappingini um FSF-steypið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*